## Málleyst millum Eto'o og Zlatan

Tað gjørdist ikki um tað heilt villa undirhaldið, tá Barcelona og Inter í gjárkvøldið møttust á San Siro í Milano. Dysturin, sum eisini varð roknaður sum uppgerðin millum Zlatan og Eto'o, ið báðir teljast millum heimsins bestu áleyparar, endaði uttan mál, men tað var í veruleikanum eitt úrslit, sum báðir partar als ikki vóru so ónøgdir við. Í hinum dystinum í bólki bólki F vann Dynamo Kiev 3-1 á Rubin Kazan.



## Kuyt skeyt Liverpool avstað

Tað gekk hampuliga tungt hjá enska Liverpool, tá teir í gjárkvøldið settu hol á sína Champions League kapping. Á heimavølli móti Debrecen stóð leingi á jøvnum, men beint undan steðginum fekk hollendski Dirk Kuyt skotið tað, sum vísti seg at gerast avgerandi. Eisini hin dysturin í bólki E endaði við teprum heimasgri, tá Lyon á heimavølli vann 1-0 móti italska Fiorentina.

## HB-AB 1-1 (1-0):

# Heldur ikki hesa ferð

HB

AB

**Meistaraheitið lá til høgrabeinið hjá HB, men vinstra beinið hjá Alex Mellemgaard vildi tað øðrvísi, tá hann við eini frísparksperlu útsetti FM-veitsluna, sum í fyrsta lagi verður sunnudagin**




Jákup Mørk



Heldur ikki hesa ferð gekk tað. Spælararnir hjá HB hingu við høvdinum, tá teir máttu staðfesta, at tað ikki eydnaðist at vinna seg fram til gullmerkini mikukvøldið

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Fagnaðurin var øgiligur, tá stadionspeakarin eina løtu mistók seg.

Hóast HB ikki megnaði at basa AB, so var FM-heitið so sera nær, tá tað framvegis stóð 1-0 til útiliðið á Toftum. Og tá tað so fræddist, at B36 hevði javnaði til 2-2 í Streymnesi, leyp tað mesta av HB-skýlinum uppfrá.

Tað gingu tó bert nøkur sekund, so rættaði varparin seg sjálvan. Og tá sama røddin nakað seinni kunngjørdi, at nú stóð 3-1 við Margáir, hvarv FM-veitslan í skýmingini, sum var um at leggja seg yvir Gundadal.

### Sovnaðu

Avgerðin lá annars til HB. Undan dystinum stóð greitt, at greiddi HB sín setning, so vildi eitt B68-kiks á Toftum parkerað gullið í Gundadali, og leingi tóktust báðar hypotesurnar at halda.

HB kom á odda longu eftir 17 minuttum, tá Fróði Benjaminsen eftir nærdyst við Tórð Thomsen í AB-málinum fekk sent bóltin í netið. Tórður noyddist løtu seinni at lata seg skifta út, og hann var alt annað enn nøgdur um, at dómarin ikki brísklaði fyri frísparki undan málinum, men tað tóktist ikki nerva HB.

Bólturin var at kalla als ikki á HB-hálvuni fyrstu trý korterini, og hóast tann heilt opni møguleikin ikki beyðst, so lúrdi og hótti HB støðugt við skjótum pasningsspæli, har øll breiddin á vøllinum varð væl og virðiliga nýtt.

Eftir steðgin kom tó vend í. Sum tað er hent nakrar ferðir seinastu dystirnar, so sovnaði HB meira ella minni, meðan AB'arnir í eins stóran mun vaknaðu.

Vanliga AB-spælið, har mótstøðan fær trupult við at spæla seg ígjøgnum, kom aftur til sjóndar, og tá møguleikin beyðst, vóru teir skjótir at senda langt niðan móti Stig Roar Søbstad og Tróndi Sigurðsson, sum hesa ferð mannaðu álopið.

### Frísparksperla

Tað gav eisini at bíta, tá Stig Roar varð trýstur í ryggin, tá hann tók móti bóltinum. Fríspark til AB á brotsteigarmarkinum, og so kom Alex Mellemgaard rennandi niðan av vinstra bakki.

Framúr sparkiteknikkurin hjá honum hevur verið eitt av vandamestu vápnunum hjá AB í ár, og tað prógvaði hann aftur, tá hann bendi bóltin upp um múrin og inn um nærmara stólpa.

Og tað kundi eisini gingið heilt galið hjá heimaliðnum. HB hevði sínar møguleikar, men hvørki Rógvi Poulsen ella Andrew av Fløtum vóru nóg neyvir, tá teir skuldu temja í fríari støðu, og ístaðin var Tróndur Sigurðsson í tveimum førum nær við at avgera. Fyrru ferðina bjargaði Marcyn Dawid tó frálíka væl, og seinnu ferðina støkk bólturin av knænum hjá áleyparanum og dygst fram við, eftir at Dion Splidt hálvfluktaði úr spískum.

### Bíðitíðin longd

Javnleikurin ber við sær, at HB-viðhaldsfólkini aftur mugu bíða nakrar dagar, áðrenn tey hava endaliga vissu fyri FM-gullinum, sum tó førkar seg eitt vet nærri hvørt umfar.

Tað kendist tó kanska ikki heilt so svárt kortini, tí viðhaldsfólkini, sum mikukvøldið høvdu leitað sær í Gundadal, vóru ikki heilt so nógv, sum roknast kundi við. Tá munnu bussarnir norður til Fuglafjarðar verða betur mannaðir, og hjá teimum er so bara at vóna, at liðið tá leverar tað, sum teir ikki hava megnað seinastu tríggjar ferðirnar.

## Tung kensla

Soleiðis sum úrslitini annars lagaðu seg, so hevði HB møguleikan at vissa sær gullið í dystinum móti AB. Tí var talan sjálvandi um vónbrot, tá hetta ikki eydnaðist, og liðskiparin, Fróði Benjaminsen, viðgekk eftir dystin, at kenslan ikki var nøkru serlig.

- Tað følist øgiliga tungt. Vit spæla faktiskt ein fínan dyst, men vit klára so bara at fáa tað eina málið, og teir skora upp á eitt fríspark, so tað er ótrúliga svárt.

Fyri steðgin hava tit eitt sera gott tak á dystinum, men tit skora ikki. Og seinastu dystirnar hevur tað gingið striltið at skora. Hvat bilar hjá tykkum?

- Har manglar bara at senda bóltin í netið. Teir hava sjálvandi eina góða verju, sum ikki hevur latið so nógv mál farið inn, so vit vistu av, at tað fór ikki at verða lætt.

Nú hava tit framvegis átta stig niður til næsta liðið, og tað eru bara tríggir dystir eftir. Verður dysturin í Fuglafirði tann, har áskoðararnir hjá tykkum loksins fáa vissu fyri gullinum?

- Tað fer tíðin at vísa. Men vit fara í øllum førum inn á vøllin fyri at vinna tann dystin, staðfestir Fróði Benjaminsen.

-mørk

## Eitt mál er einki

John Petersen, sum er annar av venjarunum hjá AB, staðfesti eftir dystin í Gundadali, at tað fyrst og fremst er ein góð verja, sum er orsøkin til góðu gongdina hjá AB.

- Vit hava verið øgiliga dugnaligir til ikki at koma langt afturum, hóast vit hava spælt illa. Ofta hava vit hildið nullið í einum vánaligum hálvleiki ella kanska bara latið eitt mál fara ígjøgnum. Og so er skjótt at koma aftur í dystin. Stigatalvan sigur eisini, at vit eru tað liðið í landinum, sum hevur latið fæst mál ígjøgnum.

- Og vit hava eisini kvalitetir fram eftir vøllinum, hóast tað kanska bara eru argjafólk og vit sjálvir, sum hava lagt hesar til merkis. Men kvalitetirnir eru har, og vit hava eisini avgjørt dystir, segði ein væl nøgdur venjari eftir dystin í Gundadali.

-mørk